Volvo sýndi fram umhvørvisbilin C30 ReCharge Concept við »plug-in funktion«. Talan er um eitt hybridsystem við battaríum, ið geva streym til el-motorarnar við hvørt av teimum fýra hjólunum. Bilurin hevur eisini 1.6 litra Flexifuel motor. Battaríini kunnu eisini løðast upp við eini vanligari stikkkontakt



# Umhvørvi og trygd ístaðin fyri hestakreftir



*Magnus Gunnarsson*
*blaðmaður*

Veðurlagsbroytingarnar koma at hava ávirkan á framleiðsluna av akførum meira enn alt annað komandi árini. Av tí at ferðslan økist so nógv um allan heim, ganga trygd og umhvørvi hond í hond í hesum døgum.

Fyrr kappaðust bilaframleiðararnir um hvør kundi sýna fram teir kvikastu bilarnar við størst motori. Nú er fullkomiliga vent í holuni hesum viðvíkjandi, og umhvørvið og trygd eru í hásæti. Eftir tær stóru veðurlagsbroytingarnar seinnu árini er stórt trýst lagt á bilverksmiðjurnar um at framleiða umhvørvisvinarligar bilar, sum dálka minst møguligt. Hetta trýst fer ikki at minka í framtíðini. Í hesum sambandi var týski samveldiskanslarin Angela Merkel og vitjaði á Frankfurt Motor Show í september, har hon helt røðu og greiddi frá, hvussu týdningarmikið tað er, at bilaídnaðurin leggur seg eftir at gera umhvørvisvinarligar bilar.

Í tí sambandi hevur týski umhvørvisráðharrin Sigmar Gabriel sent út eina ávaring til framleiðarar av teimum stóru luksusbilunum um at minka um útlátið so skjótt sum yvirhøvur møguligt. Avbjóðingin hjá bilaframleiðarunum er sjálvandi at útlátið frá teimum stóru motorunum skal minkast munandi meira enn á smáu fyri at koma á sama støði.



*Týski samveldiskanslarin Angela Merkel vitjaði á Frankfurt Motor Show*

Framsýningin í Frankfurt varð eftir øllum at døma tað heilt stóra gjøgnumbrotið fyri hybridbilar hjá fleiri av evropeisku bilverksmiðjunum.


## BILAR – serblað í Sosialinum oktober 2007

**ÚTGEVARI**
**Sp/f Sosialurin**

**BLAÐFÓLK**
**Magnus Gunnarsson**
**maggi@sosialurin.fo**

**LÝSINGASØLA**
**Joan Abrahamsen**
**joan@soialurin.fo**

**MYNDAFÓLK**
**Jens Kristian Vang**
**Álvur Haraldsen**
**Magnus Gunnarsson**

**LÝSINGAGERÐ**
**Kári við Rættará**
**Jón Tórur Einarsson**

**PRENT**
**P/F Prentmiðstøðin**

**UPPLAG**
**7.000**




**Síðan 1995 hevur Sosialurin havt fastan bilteig í blaðnum. Teigurin er í blaðnum hvønn mikudag. Endamálið er m.a. at kunna um tað sum rørir seg á bilamarknaðinum, bilasøgu og um ferðslutrygd.**

**Síðan 2000 hevur Sosialurin á hvørjum ári givið út serbløð um bilar.**



**C Sosialurin 2007**


## Innihaldsyvirlit


**s.4** VR Bilar
**s.7** OK Heilsøla
**s.7** I.R. Lastvognar
**s.8** Auto Service
**s.10** Sofus heiðraður
**s.12** Ivan Johansen Bilar
**s.13** Akstovan
**s.14** Wenzel
**s.16** Reyni Service
**s.20** Berg Motors
**s.24** Ferðslutrygd
**s.26** Norðbil
**s.27** Nordcar
**s.28** Postverk Føroya
**s.30** Føroyskur dreymabilur
**s.33** Bilarnir eru teldur
**s.35** Pivo2 og Isetta
**s.36** Gerið vegirnar tryggar
**s.39** Skandinaviskur superbilur